


## Avstralia útsetir veðurlóg

Altjóða búskaparkreppan fær nú ávirkan á tilgongdina til at avmarka broytingarnar í veðurlagnum. Avstralska stjórnin hevði ætlanir um at seta eina nýggja veðurlagslóg í gildi næsta ár, men um vikuskiftið kunngjørdi stjórnin, at lógin er útsett fyribils í eitt ár. Samstundis ætlar stjórnin at veita teimum størstu CO2-dálkarunum stuðul, sum teir kunnu laga seg til tær komandi broytingarnar. Kevin Rudd, forsætisráðharri, sigur, at sjálvt um veðurlagslógin er útsett, fer Avstralia at halda fast um málið, sum er at skarva 15 prosent av CO2-útlátinum innan 2020. Hann legði afturat, at Avstralia er sinnað at fara upp á 25 prosent, um hioni londini gera tað sama.

# Ósamd um gongdina við H1N1-beinkríminum

**Heimspressan er ymisk á máli viðvíkjandi H1N1-beinkríminum. »Kreppan er av« skrivar NRK. BBC skrivar, at »Svínakrím breiðir seg um USA«, og heimsheilsustovnurin WHO ávarar móti líkasælu**

H1N1-BEINKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Heimspressan er í morgun ósamd um hvønn veg tað ber við nýggja kríminum, H1N1-beinkrím.

Í morgun slær norska kringvarpið NRK stórt upp, at »Kreppan er av«. Tey skriva, at afturlatingin av fyritøkum í Meksiko Býi mest líkt verður tikin aftur mikudagin, og siterar forsetan í Meksiko, Felipe Calderón, fyri at siga, at landið hevur tamarhald á farsóttini.

- Vit eru í støðu til at vinna á H1N1-virusinum, segði Felipe Calderón í eini samrøðu, ið varð varpað út í út- og sjónvarpi, skrivar NRK.

Víðari skrivar NRK, at heilsumálaráðharrin José Angel Córdova upplýsir, at afturlatingin av fyritøkum helst verður tikin aftur mikudag, um hóttanin frá virusinum heldur áfram at minka. Hetta er galdandi fyri matstøð, barrir, klubbar, filmshallir, leikhús og venjingarmiðstøðir, ið vórðu biðin um at lata aftur 28. apríl.

### BBC ósamd

Meðan NRK skrivar at útbrotið av H1N1-beinkríminum er við at vera av, skrivar bretska kringvarpið BBC, at farsóttin breiðir seg um USA.

- Heili 226 tilburðir av H1N1-beinkrími eru staðfestir í 30 ymiskum statum í USA, og fleiri tilburðir eru í væntu, siga amerikanskir heilsumyndugleikar, sambært BBC.

Víðari skrivar BBC, at talið av staðfestum tilburðum í USA er økt frá 160 til 226, men at myndugleikarnir siga hetta vera orsakað av at kanningarúrslitini koma inn nú, heldur enn at tað eru fleiri tilburðir. Hinvegin skrivar BBC, at ein serfrøðingur frá amerikanska sjúku- og fyribyrgingarstovninum CDC sigur virusið verða rímiliga útbreitt.

- Í roynd og veru sirkulerar virusið kring alt USA í løtuni. Men tað merkir ikki at øll eru smittað, men innan smáu samfeløgini, siterar BBC Dr. Anne Schuchat frá CDC fyri at siga.




*Heimspressan er ymisk á máli um gongdina við nýggja H1N1-beinkríminum. Norska kringvarpið skjýtur útbrotið niður, meðan bretska kringvarpið ávarar um at tað hevur breitt seg um flestu statirnar í USA*



### WHO ávarar móti líkasælu

Heimsheilsustovnurin WHO ávarar móti at lond lækka tilbúgvingarstigið í samband við útbrotið av H1N1-beinkríminum.

Omanfyri 900 tilburðir eru staðfestir í fimm heimspørtum, sigur WHO, og myndugleikar mugu vera á varðhaldi.

Virus vaksa og minka í virkni, sigur WHO, og leggur afturat at tað er alt ov tíðliga at siga um útbrotið hevur toppa í Meksiko, har tað eftir øllum at døma breyt út.

Henda ávaringin er komin eftir at meksikanskir myndugleikar um vikuskiftið søgdu, at tilburðirnir av virusinum sóu út til at vera minkandi.

Talsmaður hjá WHO, Gregory Hartl, sigur, at tað er ein stórur møguleiki fyri at virusið kemur aftur, serliga tá vit nærkast kaldari tíðum. Hann leggur afturat, at kanska hevur virknið toppa fyri hesaferð, men at tað ikki merkir at vandin er av.

## 985 tilburðir skrásettir

**20 lond hava alment boðað frá tilsamans 985 tilburðum av H1N1-beinkrími kring heimin**

H1N1-BEINKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Meksiko hevur boðað frá 590 royndarstovuskrásettum tilburðum millum menniskju, harímillum 25 deyðsføll. Høga talið av deyðum úr Meksiko er orsakað av framhaldandi kanningum av áður tiknum royndum.

USA hevur skrásett 226 tilburðir við royndum á royndarstovum, harímillum eitt deyðsfall – ein tvey ára gomul meksikansk smágenta.

Hesi londini hava skrásett tilburðir, ið eru staðfestir á royndarstovum, uttan nakran deyða. – Bretland (15), Danmark (1), El Salvador (2), Eysturríki (1), Frakland (2), Hong Kong (1), Italia (1), Írland (1), Ísrael (3), Kanada (85), Kolumbia (1), Kosta Rika (1), Niðurlond (1), Ný Sæland (4), Spania (40), Sveis (1), Suðurkorea (1) og Týskland (8).

Eini hyggjuráð frá heimsheilsustovninum til fólk, ið ætla sær at ferðast, eru at útseta ferðina, um tey kenna seg illa fyri ella sjúk, og fyri fólk, ið hava fingið sjúkutekin eftir altjóða ferðir um at leita sær læknahjálp sambært lokalum vegleiðingum.

WHO mælir framvegis frá at seta í verk ferðabann til ávís støð ella at lata landamørk aftur.